# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
post@sosialurin.fo
tlf 341800 fax 3418

## Neyðugt samstarv

Um vikuskiftið hevur Útnorðursráðið havt ársfund í Føroyum. Útnorðursráðið er eitt ráð av tinglimum út Grønlandi, Íslandi og Føroyum. Hetta ráð hevur bert ráðgevandi myndugleika mótvegis stjórnunum í teimum trimum londunum í politiskum málum. Men í aðrar mátar kann ráðið taka avgerðir t.d. um ymisk tiltøk. Í ár hevur eitt av tiltøkunum verið ein veðurlagsráðstevna. Henda ráðstevna hevur umrøtt, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka okkara havumhvørvi, og hava nøkur av mætastu vísindafólkum um okkara leiðir havt framløgur. Hetta er eitt sera týdningarmikið evni, og eiga Útnorðursráðið og formanskapur tess við Henrik Old á odda stóran heiður uppibornan fyri hetta frálíka tiltak.

Politiskt samstarv í útnorði hevur sera stóran týdning og fer týdningurin av hesum samstarvi at vaksa í framtíðini. Bert spell, at tað samstarv, sum er, er so lítið sjónligt, og at so lítið sæst og hoyrist til tað, sum veruliga hendir. Tað er júst tí, at ein ráðstevna, sum tann, sum var leyugardagin, hevur so stóran týdning. Ráðstevnan kann vísa almenninginum, hvussu umráðandi tað er, at vit samstarva. Men her má vera mangt annað at samstarva um – og tað verður ivaleyst samstarva eisini, vit hoyra bara einki um tað. Útnorðursráðið hevur skrivstovu í Reykjavík. Tað má vera ein uppgáva hjá hesari skrivstovu at gera ráðið og tess virksemi nógv meira sjónligt. Kanska skuldi Útnorðursráðið havt eina skrivstovu á Bryggjuni í Keypmannahavn.

Eitt ítøkiligt úrslit av politiska útnorðursamstarvinum er Barnabókavirðisløn Útnorðurs. Hetta er eitt frálíkt tiltak. Í ár kom virðislønin so til Føroya og tað eiga allir føroyingar at fegnast um. Vit ynskja vinnaranum Bárði Oskarsson hjartaliga tilukku! Hetta er gott fyri føroyskar barnabøkur og fyri allar Føroyar. Vónandi fer arbeiðið hjá Útnorðursráðnum at mennast, tí hesi trý londini eru tvungin at samstarva, um tey skulu megna at vinna sum mest burtur úr altjóðagerðini.

## Undarlig grein hjá Rolf Guttesen

**BJARTI MOHR**
býráðslimur fyri Fólkaflokkin í Havn



Hesin góði Rolf Guttesen tykist ikki sørt illur inn á Jóannes Patursson. Hann um tað.
Jóannes er ikki halgimenni og roknaði seg sjálvan ikki sum halgimenni. Best sæst hetta á sálminum »Millum tey lágu tú helt teg, mín kongur hin sæli« í sálmabókini (nr. 176 ) og í songum hansara í Song Bók Føroya Fólks. Hetta sæst eisini á brævskrivingini millum pápan og unga Jóannes, tá ið hann var í Noreg og fekk sær útbúgving.
Hví Jóannes bóndi skal dragast upp í føðingardag Sambandsfloksins upp á henda mátan er eisini óskiljandi. Hann livdi frá 1866 til 1946 og hoyrdi samtíðini til, sum tá var. Tað ber ikki til at draga hann inn í dagsins tjak, uttan so at fyrivarni verður tikið fyri hesum. At spilla deyðar menn út, er annars ikki vanligt í Føroyum og er uttan fyri alt lágmark.
Eg skilji ikki, at Rolf Guttesen fer út við tílíkum skuldsetingum ímóti Jóannes Paturssyni. Onki menniskja er fullkomið, men Jóannes legði hóast alt eina rúgvu eftir seg, bæði í arbeiði og í mentanarlívi føroyinga. Hann stendur fyri nógvum av okkum, sum ein fyrimynd í dagliga arbeiðinum her á klettunum, og tað skal eingin taka frá okkum.

## Fý skamma teg Rolf Guttesen

**HANUS VANG**



Tað er undir alt lágmark at hunddálka farin fólk!
Tá hin hunddálkaði har afturat er eitt av høvuðsskaldum Føroya, ja – so kann ein neyvan ríða lægri!
"Boðar tú til allar tjóðir"
Jóannes Paturson fekk ikki greinar sínar tiknar upp í donskum bløðum. Tá hann so fekk norsk bløð at taka sjónarmiðini upp, varð hann ákærdur fyri landasvik - ímóti Danmark!
Kann nakar vera føroyingur, - og asfaltføroyingur í fýratifýra ár, og so vera verðinsmeistari í at vita hvat, ið best er fyri okkum, ið her strevast og búleikast?
Tað er »totalt langt úti«.
Rolf Guttesen fór í coma í mei 1998. Har er hann ikki undankomin enn.
Men nú ráða menn hansara fyri borgum.
Best var um Rolf helt seg til geografiina, tí har er hann bæði greiður og dyggur!
Sambandsgreinarnar er best at gloyma.
Ráðtt verður til, at Rolf fær sær eina skilaforðing ímillum heimateldu sína og sokallaða óhefta Tíðindablaðið Sosialin.
Góðan betring!gði hóast alt eina rúgvu eftir seg, bæði í arbeiði og í mentanarlívi føroyinga. Hann stendur fyri nógvum av okkum, sum ein fyrimynd í dagliga arbeiðinum her á klettunum, og tað skal eingin taka frá okkum.

## Aftursvar: Viðbragd sum væntað

**ROLF GUTTESEN**



Jógvan Jacobsen í Gundadali var so ein av teimum, sum ikki dámdi at síggja nøkur kritisk orð um ein av teim mytologiseraðu "sjálvsstýrishetjunum."
Tó, í einum, hann skrivar í Sosialinum 18.08.06, hevur hann púra rætt, og eg citeri:
"Og hvat hevur Jóannes Patursson, sum ongantíð á ævi síni var sambandsmaður, við søgu Sambandsfloksins at gera?"
Tað var tað sama, sum fekk meg at stúrsa við, tá Sosialurin brúkti nakað um "saft og kraft í Jóannes Patursson" sum yvirskrift til eina samrøðu við Anju Andreassen um nýggju bókina um Sambandsflokkin. Nettup hatta helt eg hanga illa saman, og tað heldur Jógvan Jacobsen eisini, skilji eg.

### Yvirskriftin vísti til sakina

Men Jógvan Jacobsen sigur seg ikki fotstranda mína yvirskrift: "Meira saft og kraft. Ella: Hvat bagir Sosialinum." Hann sigur at einki samband er millum yvirskrift og innihald. Tað burdi tó ikki verið so torført.
Fyrri partur sipar beinleiðis til sjálva yvirskriftina, sum stóð í Sosialinum. Og annar partur er jú bara ein mild undran yvir, at blaðið er so óskettið, frekt ella illa óupplýst, at at draga JP inn sum eygnariv fyri at lesa um nýggja bók um Sambandsflokkin. Orsøkin til at eg yvirhøvur skrivaði nøkur orð um JP var tann, at hann var politikkari, ikki bara ein privatur persónur. Hann er hjá nokkso nógvum bara blivin ein hálvgudur ella guru, sum verður tilbiðin. Sum JJ sjálvur nevnir handan bóndan: "tjóðskaparhetja". Tey sum ikki fylgja rákinum, fáa av at vita sum trúðarvillingar.

### Realitetur ella myta

So leingi sum nøkur trúgva uppá "tjóðskaparhetjur", núlivandi ella ikki, so mugu hesir hetjudyrkarar finna seg í, at ikki øll taka undir við hetjudyrkanini. Hatta er ein spurningur um politikk og áhugamál, ikki persónar. Eg havi ikki ætlað at siga nakað um persónin, men nettup um hansara politikk og áhugamál, sum hann legði framm í skrift og talu. Júst í politikki var JP stokk-konservativur, og sum eg havi dokumenterað, eisini fascistavinarligur, sum so nógv onnur í Europa tá.

### Forboðið at skifta orð og nývurdera?

Um tað verður forboðið at umtala søguligar persónar, sum nú ikki eru á lívi, soleiðis sum Jógvan leggur upp til, so verður ógjørligt at fáa meira at vita um Føroya søgu.
So verður søgan gjørd til mytologi og gudalæru.
So verður slætt gólv fyri nútíðar herðaklapparum og hetjudyrkarum, sum mála glitrandi glansbíløt og halda tárapersandi talur.
Tú gerst blindur, um politikkarar og persónar í søguni verða mytur og hálvgudar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.